Úr Syðrugøtu til Japan

– Ein dreymur gongur út –

Elsa Huusgaard er fødd og uppvaksin í Syðrugøtu, mamman kemur úr Fuglafirði og pápin er úr Gøtu - Selma og Annfinn Huusgaard.
Elsa er 29 ára gomul og býr í dag í Japan. Jólafrítíðina helt hon í Hálandi, men beint eftir nýggjár kom hon heim, og tað mesta av januar mánaði hevur hon verið saman við familjuni í Syðrugøtu. Týsdagin 1. februar fór hon aftur tann langa vegin til Japan, har hon hevur eitt verk at gera.
Vit hava hitt Elsu á máli har hon greiðir okkum frá sínum lívi

Elsa Huusgaard úr Syðrugøtu er 29 ára gomul og býr í dag í Japan

LÆRARI
Poul Jóhan Djurhuus
gjaranes@post.olivant.fo

Tá Elsa bert var 16 ára gomul, hoyrdi hon um møguleikan at fara til Japan ígjøgnum AFS sum útvekslingsnæmingur. Hetta hevði hennara stóra áhuga, og hon gjørdi av at royna. Kom at búgva hjá eini japanskari familju nakað norðanfyri Tokio, í einum lítlum býi, sum kallast Joetsu í Niigata-økinum. 190.000 fólk búgva í hesum býnum. Elsa sigur, at í Japan er ein býur við hesum fólkatalinum ein lítil býur.

Áhugin fyri Japan vaknar

Í Joetsu gekk Elsa í studentaskúla, har hon læs enskt og japanskt, og har búði hon frá februar 1992 til februar 1993 hjá eini japanskari familju.

– Tað, sum vakti mín serliga áhuga fyri Japan, var, tá eg uppdagaði, at fólkið lítið og einki kendi til kristindómin. Tey vistu, at kristindómurin var eitt slag av mentan í vesturheiminum, men vistu als einki um sjálva kjarnuna í kristindóminum – evangeliið um Jesus.

– Vit vóru einans 10 fastbúgvandi útlendingar í alt í býnum. Eg var 16 ára gomul og hinir útlendingarnir vóru tilkomin fólk, so eg kendi meg rættuliga unga ímillum tey. Tey vóru øll góð við meg, so eg hevði tað stak gott. Grundin til at hesi vóru komin til Japan var at undirvísa lokalfólki í enskum. Tríggir av hesum útlendingunum vóru trúboðarar, og nýttu undirvísingina í enskum sum útgangsstøði í trúboðaravirkseminum.

– Hesi høvdu eisini kristnar radiosendingar frá einum lokalradio í býnum, har eg eisini fekk høvið at taka lut m.a. við at greiða frá mínum persónliga kristna vitnisburði. Hetta var við til at gera, saman við mínum langa ljósa hári, tí eg sá annarleiðis út enn lokalfólkið, at eg gjørdist eitt kent andlit í býnum. Tá eg var ørindir í býnum, so heilsaðu tey upp á meg, sum eg var ein av teirra egnu. Hetta gjørdi sjálvandi sítt til, at eg kom at kenna meg ómetaliga vælkomnan og kom at halda nógv av tí japanska fólkinum.

– Tað var meðan eg búði her, bert 16 ára gomul, at áhugin vaknaði í mær at fara til Japan at undirvísa í enskum og á tann hátt at virka sum trúboði har.

Elsa sigur, at enskt hevur als ikki verið undirvísingarevni í Japansku barnaskúlunum inntil fyri fáum árum síðani. Hesi seinastu árini er áhugin fyri enska málinum vaksin munandi ímillum Japanska fólki, og í dag byrja børnini at læra enskt longu í fjórða klassa.

– Japanarar ferðast nógv úti í heimi, bæði sum vanlig ferðafólk og sum vinnulívsfólk, og tað er m.a. av hesum, at krøvini til førleika í enskum eru vaksin.

Leiðin gongur til Skotlands og Århus

Tá AFS-árið var liðugt í februar í 1993 kom Elsa heimaftur á klettarnar í Syðrugøtu og fór at ganga í 1.g í studentaskúlanum við Gøtugjógv og í Kambsdali, og á heysti í 1995 fór hon til Motherwell í Skotlandi á bíbliuskúlan hjá GLO, og var liðug har í juni í 1996.

So gekk leiðin aftur til tað japanska, men nú til Aarhus. Í 1996 byrjaði hon at lesa japanskt á universitetinum í Aarhus. Í universitetshøpi kallast hesin lesturin japanologi. Elsa hevur lisið japanskt í fýra ár, men hesi árini hava ikki verið í einum, tí hon hevur verið burtur frá í fleiri millumbilum, har hon m.a. hevur verið styttri og longri lestrartúrar í Japan.

Flytur til Japans

Í september í 2002 fór hon aftur til Japan, og nú búsettist hon í býnum Osaka, sum liggur einar 400 km. í ein suðurvestan úr Tokio, við suðurstrondina av Honshu-oynni, sum er høvuðsoyggin í Japan.

Í Osaka búgva 2,6 milliónir fólk. Næststørsti býur í Japan og týdningarmiklasti havnabýurin við nógvum ídnaði, so sum maskin-, pappír- og klædnaídnaði og eisini skipabygging. Alt hetta er við til at gera Osaka til ein stóran útflutningsbý. Har er stórt bankavirksemi, og kann býurin eisini prýða seg við heitinum sum universitetsbýur. Religiónin vísir eisini sítt andlit í býnum, við tað at har eru mong kend Buddhatempul.

– Religiónirnar, shintuisman

Her býr Elsa Huusgaard